LMS

# Lærugreinaráðgevar

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. oktober 2007 ella skjótast gjørligt eftir hetta.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um lærugreinarnar **enskt, týskt, landalæru, søgu og samtíð.** Tilsamans 12 lønartímar um vikuna eru at søkja. Ein lønartími er umleið 1,6 fyrisitingartími.

**Starvslýsing**
Starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt, at ráðgevin skal:

- virka fyri einari fakligari, námsligari og tøkniligari menning í skúlanum
- ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum
- ráðgeva í sambandi við skeið og eftirútbúgving.

Lagt verður upp til skipað samstarv millum ráðgevarnar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjari

- hevur hollan ástøðiligan kunnleika og góðar starvsligar royndir
- hevur áhuga fyri námsfrøðiligum arbeiði og fyri nýtslu av KT í undirvísingarhøpi
- hevur góð samstarvsevni og evni at samskipa
- hevur førleika at menna samstarvið við starvsfelagar, stovnar og lærarar
- verður ein virkin partur av toymisumhvørvinum í Landsmiðstøðini og samstundis kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**

- eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti við lærarar, skúlar og skúlamyndugleikar
- arbeiði á einum høgum fakligum stigi og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og lønt í lønarflokki 30.3.

Setanartíðin er í fyrstu atløgu 3 ár, har fyrsta árið er eitt royndarár. Síðani kann setanartíðin verða longd. Um serlig viðurskifti tala fyri hesum, kann setanartíðin leingjast út yvir 7 ár.

Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v., o.ø. skulu sendast til:
**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
ella t-post: lms@lms.fo
Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 27. august 2007**.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

**www.lms.fo** **Landsmiðstøðin** LMS

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

# TVINGSILSSØLA YVIR ÚTRÓÐRARBÁT

Eftir áheitan frá Jóhan J. Lamhauge, advokati, Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, verður hildin tvingsilssøla týsdagin, tann 4. september 2007, kl. 10.00, á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, (AS 2-16/2007) yvir útróðrarbátin

**»M/B Norðoyingur«**

ið Sp/f Norðoyggjafelagið undir konkurs er eigari av. Báturin hevur kenningsbókstavir OW 2073, og havnakenningsbókstavir KG 56. Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 4A, og hevur í inniverandi fiskiári fingið tillutað 30 fiskidagar á landleiðini.

Báturin er smíðaður úr eik, bygdur í Rødvig í Danmark í 1973 og heimahoyrandi í Klaksvík. Báturin er merktur 21.2 brt.

Báturin verður seldur við tilhoyrandi útgerð, so sum tilhoyrandi nautiskari útgerð, línuspæli v.m.

Fyrireikandi fundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni **týsdagin, 7. august 2007, kl. 10.30.**

Einhvør, ið heldur seg hava rættindi yvir bátinum ella møguligari útgerð, verður biðin um at møta.

Avrit av tvingsilssølutreytum kunnu fáast við at venda sær til advokat Jóhan L. Lamhauge.

Skjøl í sambandi við tvingsilssøluna liggja frammi til skoðan á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn.

***Føroya Fútarættur, tann 13. juli 2007***




GRØNLAND • ÍSLAND • FØROYAR

Føroyskt, íslendskt og grønlendskt samstarv

# SAMIK og FITUR eitur nú NATA

Øll, ið hava áhuga fyri viðurskiftunum millum Føroyar, Ísland og Grønland, kunnu nú søkja um stuðul til verkætlanir, vørumenning, ferðir og tílíkt. Arbeiðið skal tó fevna um minst tvey av hesum londunum.
**Stuðul verður veittur til verkætlanir innan hesi øki:**

*Útbúgving, uppihald til starvsvenjing, ferðavinnuútbúgving og líknandi.*

*Millumlanda samstarv, skúlaferðir, mentanartiltøk og líknandi.*

*"Kombinationsturisme", cruise, tema ferðir, short break, og líknandi.*

*Marknaðarføring og greining av ferðavinnu.*

Stuðulin verður veittur til verkætlanir ella virksemi, sum fer fram innan árslok í 2007.
Umsóknarbrævið skal skrivast á donskum ella enskum, við nærri frágreiðing um verkætlanina og fíggjarætlan, og skal sendast til:

NATA co/
**SamVit**
Undir Bryggjubakka 17
100 Tórshavn
Føroyar

**Ferðamálastofa Íslands**
Lækjagata 3
101 Reykjavík
Ísland

**Greenland Tourism**
Strandgade 91, 2.
1401 København K
Danmark

Evstamark fyri at senda inn umsóknir er 22. august 2007. Umsóknarbløð og leiðbeining fáast á
**www.tourist.fo** **www.ferdamalastofa. is** **www.greenland.com**

# Skeið á Fróðskaparsetri Føroya

## heystið 2007

**Próvskeið í føroyskum**
Á skeiðinum lærir tú at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjølháttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi og tú fært betri fatan av føroyska málinum.
Skeiðið byrjar á **Fróðskaparsetrinum, Jónas Broncks gøtu 25, 100 Tórshavn**
3. september og endar 28. november 2007 (12 vikur).
Próvtøkan verður 3. og 5. desember 2007.

Undirvísing er mánadagar og mikudagar, báðar dagar kl. 15.15 - 17.30.

Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt sum móðurmál og hava gingið í miðnámsskúla ella samsvarandi.
**Lærari: Lena Reinert**

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni.
**Tilmeldingarfreistin er sett til 17. august 2007.**
Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, so hvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 1.000 kr.**

Fyri próvtøku í føroyskum gjalda næmingar 500 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

TEAMBS

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
**www.setur.fo**